# Barnsburðaravloysari til telefonavgreiðsluna hjá Føroya Tele á Tvøroyri

"Eingin framtíð er í starvinum, framtíðin er í starvsfólkinum"

- George Crane -



Søkt verður eftir barnsburðaravloysara til telefonavgreiðsluna hjá Føroya Tele á Tvøroyri at byrja sum skjótast.

**Arbeiðið**
- Øll vanlig telefonavgreiðsla
- Fyrispurningar frá viðskiftafólki
- Avgreiðsla av tænastum

**Umsøkjarin**
- Tú hevur hug og førleika til kundatænastu
- Tú dugir at seta teg inn í nýggja tøkni
- Tú hevur góð evni at samstarva í toymi og við ymiskar starvsfólkabólkar
- Tú ert íðin at røkka ásettum málum
- Tú hjálpir, har tað er neyðugt
- Tú avgreiðir mál skjótt og væl

Handilin hjá Føroya Tele á Tvøroyri er ein av seks handlum kring landið, og telefonav-greiðslan á Tvøroyri avgreiðir uppkall til allar seks handlarnar.

Telefonavgreiðslan á Tvøroyri er opin allar vanligar handilstíðir, og arbeitt verður í skift-um við hini starvsfólkini í telefonavgreiðsluni.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Fleiri upplýsingar fáast hjá Niels Hammer á tel. 303481 ella á Starvsfólkadeildini á tel. 303030.

Umsóknir skulu vera FøroyaTele í hendi í seinasta lagi týsdagin 5. februar 2008, og tær skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn
ella starvsfolkadeildin@ft.fo

**Handlarnir hjá Føroya Tele eru skipaðir undir FT Samskifti, sum er dótturfelag í samtakinum Føroya Tele. FT Samskifti hevur um hendi alla kundarøkt, sølu, alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og alla støðarútgerð til fastnetstelefoni og breiðband. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele. 105 fólk starvast hjá FT Samskifti.**

FØROYATELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*





**Marine Harvest** er størsta alifelag í heiminum, og verður triði hvør aldur laksur framleiddur í einum Marine Harvest felag. Í Føroyum rekur Marine Harvest 4 alibrúk og eina smoltstøð, og framleiða vit 6.000 tons av laksi um árið.

## ALARI
## til Marine Harvest Faroes P/F

Søkt verður eftir alara/røktara til alingina hjá Marine Harvest Faroes á Veðranesi.

**Arbeiði fevnir um:**
- at gera aliøkið klárt til várútsetingina 2008
- fóðring og røkt av fiski
- dagligt viðlíkahald av útgerð

Roknast má við kvøldar- og vikuskiftisvaktum. Løn sambært avtalu.

Áhugað kunna tosa við rakstrarleiðaran á Veðranesi, Finnur Johannesen, á telefon 777075.

Umsóknarfreistin er 15. februar 2008

Marine Harvest Faroes P/F
Ternubrekkan 1
695 Hellurnar

www.marineharvest.com

marineharvest
excellence in seafood





# Sethús til sølu
## Krosslíð 4, Tórshavn

Sera vælhildin sethús í 2 hæddum til sølu.

**Miðhædd:** hjallur, gongd, wc, baðirúm, sovi-kamar, 3 kømur, køkur, spísistova og stova.

**Kjallari:** gongd, lítil køkur, wc, baðirúm, fýrrúm, trappugongd, tvey stór kømur, kjallararúm og vaskirúm.

Húsini hava urtagarð og liggja sera veðurgott.

**Áhugaði kunnu ringja tlf. 281414, 270484 ella 317306**



Lesið
**Sosialin**
-so eru tit við!